# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Sofus í Smiðjuni

Sofus Poulsen, listamaður, letur upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík hósdagin 18. februar við fernisering kl. 15.

Á framsýningini verða millum 20 og 30 málningar, sum allir eru málaðir í heyst og í ár.

Fleiri av málningunum eru í støddini 80x100, og nakrir eru størri enn tað.

Framsýningin er opin til og við mikudagin 24. februar. Allar dagar frá kl. 14-18, tó leygardagin frá 12-18.

*-red*



*Sofus Poulsen letur upp eina málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík hósdagin 18. februar*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Láturkrampi í Norðurlandahúsinum

Komandi vikuskifti fáa havnarfólk høvi at síggja skemtileikin »Stundum - Stundum ikki« í Norðurlandahúsinum, sum Klaksvíkar Sjónleikarfelag framførir.

Leikurin er ein farsa eftir kenda høvundaparið Arnold og Bach. Føroyingar kenna høvundarnar frá ótalligum skemtileikum, eitt nú Fríggjarfløkjan og Spanska Flugan, ið spældu fyri óhoyrt nógvum áskoðarum á sinni.

Saga Jonsdóttir er leikstjóri. Hon er íslendingur og hevur sett fleiri leikir upp saman við klaksvíkingum. Seinast Emil úr Lønnibergi, sum varð spældur í fjørð.



Pallmyndin varð upprunaliga nýtt í Íslandi, har leikurin gekk fyri fullum húsum. Tá ið Íslendingar vóru lidnir, keypti Klaksvíkar Sjónleikarafelag pallmyndina, og hendan verður nú sett upp í Norðurlandahúsinum til vikuskifti.

Leikurin hevur gingið í Løkshøll síðani seinast í januar, og hetta verður seinasta høvi at síggja leikin.

Sýningarnar verða leygardagin 20. februar klokkan 20.00 og sunnudagin 21. februar klokkan 19.00 Atgongumerki fáast á www.nlh.fo, í Norðurlandahúsinum og á kunningarstovunum.

### Merkisdagar

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin tann 20. feb. verður Palli Olsen í Fuglafirði 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**80 ára føðingardagur**
28. feb. verður Hildigarð Nattestad, Hvalba, 80 ár. Dagurin verður hildin 20. feb. í gistingarhúsinum í Øravík, kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
4. feb. høvdu Oda og Árni Frederiksberg á Strondum gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin fríggjakvøldið 19. feb kl. 18 í Kelduni í Skálafirði. Øll eru vælkomin.

**Brúdleyp**
Sunnudagin 21. feb. giftast Thomas F. Johannessen, Æðuvík, og Ann-Margit Hansen, Saltnes. Opið hús verður í Stóratún 14, Æðuvík, frá kl. 18.

**Brúdleyp**
Páskadag 4. apríl giftast í Thyregod Kirke, Súsanna Joensen frá Svínoy og Kim Gotsæd. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma í brúdleyp, biðast vinarliga siga frá á tlf: 0045 26535429 áðrenn manadagin 15. mars.

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

## Rigmor Mydtskov deyð

Mánadagin 15. februar andaðist kendi danski fotografurin Rigmor Mydtskov, 84 ára gomul.

Rigmor Mydtskov var í mong ár fastur fotografur hjá Margrethu drotning. Samstarvið teirra millum byrjaði, tá Margretha prinsessa kontaktaði hana í 1963. Hetta førdi til, at Rigmor Mydtskov varð fotografur hjá henni í umleið 40 ár.



*Rigmor Mydtskov*

Rigmor Mydtskov varð fødd 23. mai 1925 í Keypmannahavn. Hon lærdi til fotograf hjá pápa sínum Hans Julius Mydtskov í 1944. Í 1954 byrjaði hon at arbeiða sum fotografur hjá Kongiliga Teatrinum, har hon eisini varð fotografur hjá fleiri kendum donkum sjónleikarum.

*-red*



*Mynd hjá Rigmor Mydtskov av Drotning Margrethu*

### Dagurin

**17. februar. Finandus**, deyður ár 603. Írskur abbati í kleystrinum Cloneenagh í Írlandi. (Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*